# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 10. desember 2009





# Favorittarnir stóðu seg

**Barcelona og Inter spældu seg víðari úr bólki F, og í bólki G megnaði Stuttgart at toga seg víðari. Hinvegin varð dagurin í gjár enn eitt vónbrot hjá Liverpool**





Jákup Mørk


Seinastu dystirnir í bólkaspælinum í Champions League vórðu spældir í gjárkvøldið.

Og her gjørdist talan ikki um nakra sensatión yvirhøvur. Í bólki F var nakað av trýsti á Inter og Barcelona, men bæði megnaðu kortini at spæla seg víðari.

Barcelona var annars aftanfyri í útidystinum móti Dynamo Kiev, men mál frá Xavi og Messi koppaðu tó uppgerðini til fyrimuns fyri Barca.

Og heima á San Siro helt Inter høvdið kalt, tá teir spældu móti Rubin Kazan. Ein sigur var krav til Inter, og við málum frá Etoó og Balotelli syrgdu teir eisini fyri hesum.

Seinasta ivamálið, sum varð avgjørt, var í bólki G, har Stuttgart hevði heimavøll móti Unirea Urziceni. Og tann spurningin hevði heimaliðið greitt eftir bara 11 minuttum. Tá høvdu Marica, Trasch og Pobrebnyak skotið vertirnar upp á 3-0, og so var ikki serliga nógv, sum gestirnir kundu gera.

Eitt av stóru vónbrotunum í ár hevur verið Liverpool, sum longu hevði útspælt sín leiklut, áðrenn teir í gjár tóku ímóti Fiorentina. Benayoun legði her heimaliðið á odda stutt fyri steðgin, men eftir steðgin skoraðu Martin Jørgensen og Alberto Gilardino fyri Fiorentina, sum soleiðis vann bólkin framman fyri Lyon, meðan Liverpool í vár skal royna seg í European League.

## Úrslitini mikukvøldið

**Bólkur E**

| | |
|---|---|
| Liverpool-Fiorentina | 1-2 |
| Lyon-Debrecen | 4-0 |

**Bólkur F**

| | |
|---|---|
| Dynamo Kiev-Barcelona | 1-2 |
| Inter-Rubin Kazan | 2-0 |

**Bólkur G**

| | |
|---|---|
| Sevilla-Rangers | 1-0 |
| Stuttgart-Unirea Utziceni | 3-1 |

**Bólkur H**

| | |
|---|---|
| Olympiakos-Arsenal | 1-0 |
| Standard Liege-AZ Alkmaar | 1-1 |

## Støðan í bólkaspælinum

**Bólkur A**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Bordeaux | 6 | 5 | - | 1 | - | 0 | 9 | 2 | 7 | 16 |
| 2 Bayern München | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 9 | 5 | 4 | 10 |
| 3 Juventus | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 4 | 7 | -3 | 8 |
| 4 Maccabi Haifa | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 0 | 8 | -8 | 0 |

**Bólkur B**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Manchester Utd. | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 11 | 6 | 5 | 13 |
| 2 CSKA Moskva | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 10 | 0 | 10 |
| 3 VfL Wolfsburg | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 9 | 8 | 1 | 7 |
| 4 Besiktas | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 3 | 8 | -5 | 4 |

**Bólkur C**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Real Madrid | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 15 | 7 | 8 | 13 |
| 2 AC Milan | 6 | 2 | - | 3 | - | 1 | 8 | 7 | 1 | 9 |
| 3 Marseille | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 10 | 10 | 0 | 7 |
| 4 FC Zürich | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 5 | 14 | -9 | 4 |

**Bólkur D**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Chelsea | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 11 | 4 | 7 | 14 |
| 2 FC Porto | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 8 | 3 | 5 | 12 |
| 3 Atlético Madrid | 6 | 0 | - | 3 | - | 3 | 3 | 12 | -9 | 3 |
| 4 Apoel Nicosia | 6 | 0 | - | 3 | - | 3 | 4 | 7 | -3 | 3 |

**Bólkur E**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fiorentina | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 14 | 7 | 7 | 15 |
| 2 Lyon | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 12 | 3 | 9 | 13 |
| 3 Liverpool | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 5 | 7 | -2 | 7 |
| 4 Debrecen | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 5 | 19 | -14 | 0 |

**Bólkur F**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Barcelona | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 7 | 3 | 4 | 11 |
| 2 Inter | 6 | 2 | - | 3 | - | 1 | 7 | 6 | 1 | 9 |
| 3 Rubin Kazan | 6 | 1 | - | 3 | - | 2 | 4 | 7 | -3 | 6 |
| 4 Dynamo Kiev | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 7 | 9 | -2 | 5 |

**Bólkur G**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Sevilla | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 11 | 4 | 7 | 13 |
| 2 Stuttgart | 6 | 2 | - | 3 | - | 1 | 9 | 7 | 2 | 9 |
| 3 Unirea Urziceni | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 8 | 8 | 0 | 8 |
| 4 Rangers | 6 | 0 | - | 2 | - | 4 | 4 | 12 | -8 | 2 |